Anja, Ey›hild og Heidi hava altí› veri› nógv saman. Í dag seta tær føroyskt met, tá tær ver›a vígdar í senn í Vágs kirkju

Mynd: Jens K. Vang

Seta met í brúdleypi

Tá systrarnar Anja, Ey›hild og Heidi í dag ver›a vígdar í Vágs Kirkju, seta tær føroyskt met. Hetta er nevniliga fyrstu fer› í føroyskari søgu, at tríggjar systrar giftast samstundis

BRÚDLEYP
John Johannessen

Nógv stákan hevur seinastu dagarnar veri› undir lonini hjá Ey›finni og Ingibjørg Mørk vesturi vi› vatni› í Vági. Í dag skulu tríggjar av teimum f‡ra døtrunum hjá teimum giftast — samstundis.

Anja, Ey›hild og Heidi eru ávikavist 35, 30 og 28 ár og eru vaksnar upp saman. Tær hava altí› veri› tætt kn‡ttar at hvørjari a›rari, og tí var ta› fyri tær ein heit náttúrlig avger›, tá tær gjørdu av at giftast samstundis og halda brúdleyp saman.

Føroyskt met

Sí›ani avger›in um trífalda brúdleypi› var› tikin, hava skyldfólk og vinir hjá brú›arpørunum kanna›, um ta› á›ur í n‡ggjari føroyskari søgu er hent, at tríggjar systrar eru giftar samstundis. Og tey eru komin til ta› úrslit, at brúdleypi› er føroyskt met.

Eitt líknandi brúdleyp var í Vestmanna fyri nøkrum árum sí›ani. Men tá var talan um tvær systrar og ein beiggja, sum giftust samstundis. Eingin veit um, at tríggjar systrar á›ur eru giftar í senn í Føroyum.

Heidi var fyrst

Systrarnar hava fyrr ofta skemta› vi›, at tær fóru at giftast í felag. Men hetta kom aldri longur enn til skemt.

Men fyri fimm mána›um sí›ani kom Ande, sjeikurin hjá Heidi, vi› hugskotinum um, at tey skuldu giftast beint á›renn jól. Og tá Ey›hild og Anja fingu hetta at vita, gjørdu systrarnar av, at tær allar skuldu giftast í felag.

Allar tríggjar systrarnar hava leingi liva› saman vi› monnunum, tær hvør í sínum lag skulu giftast vi›, og tí var skjótt at gera av, at tey nú skuldu taka seg saman og giftast.

Pápin, Ey›finn Mørk, er ikki bilsin um, at sytrarnar hava gjørt av at giftast í felag.

– Tær eru so samanrotta›ar, at tær hava bí›a› efir hvørjari a›rari, sigur Ey›finn Mørk.

Mørk sytrarnar eru f‡ra. Men tann yngsta, i› eitur Rini, hevur enn ikki funni› tann rætta, og tí bar ikki til at halda ferfalt brúdleyp.

Vildu hava Hera

Tá avger›in um at giftast í felag endaliga var tikin, skuldu pørini í gongd vi› ta› praktiska arbei›i›, i› fylgir vi› einum brúdleypi. Ta› fyrsta, tey skuldu gera, var at finna ein prest, i› vildi víga tey.

Um hetta mundi› var prestaloysi í Vági. Men ta› darva›i ikki teimum trimum pørunum. Tey vildu hava ein ávísan prest at gifta seg, og tí kom ta› væl vi›, at eingin prestur var at venda sær til í Vági.

Presturin skuldi vera Heri Joensen, fyrrverandi prestur í Vági. Ta› iva›ust tey onga løtu í. Og hóast Heri Joensen hevur úr at gera í sínum starvi sum prestur í Havn, játta›i hann beinan vegin at vera vi› til gle›iligu hendingina, sum skuldi fara fram í Vágs Kirkju leygardagin 16. desember. Størsta dagin í lívinum hjá teimum øllum seks.

Øll vilja hjálpa

Hóast talan er um eitt ógvuliga stórt brúdleyp vi› 650 gestum, hevur ta› veri› leikandi lætt at fyrireika.

– Vit hava ikki so miki› sum baka› eina einastu kaku sjálvar. Øll ynskja at hjálpa at fyrireika brúdleypi›, og vit hava fingi› so nógva hjálp, at vit næstan eru slopnar undan at gera naka› sjálvar, siga systrarnar vi› ein munn.

Ta› sama siga ernu foreldrini. Tey eru ógvuliga fegin um stóru hjálpina.

– Eg eri vísur í, at hjálpin hongur saman vi›, at tær altí› eru fúsar at hjálpa ø›rum, tá naka› hendir, sigur pápin, og mamman, Ingibjørg, tekur undir vi› honum.

Brúdleypi› skal standa í VB høllini vesturi á Ei›inum. Somulei›is er ætlanin, at brú›arhús skal haldast í VB høllini sunnudagin.

Fyri at halda st‡r á teimum 650 gestunum, sum koma til bor›haldi› í høllini, hava brú›arpørini gjørt av, at Toger› Su›uroy skal vera sokalla›ur toast master og st‡ra bor›haldinum.

Átta syskin

Anja, Ey›hild og Heidi eru tríggjar av átta syskjum. Tey eru f‡ra systrar og f‡ra beiggjar.

Tá hesar tríggjar elstu systrarnar í dag skulu giftast burtur, sleppur pápin at lei›a elstu dótturina, 35 ára gomlu Anju, upp eftir kirkjugólvinum. Ey›hild, sum er 30 ár, sleppur elsti beiggin, Jens, at geva burtur og Ey›hild, sum er 28 ár, sleppur næstelsti beiggin, Levi, at føra upp til altari›.

– Hetta ver›ur ein stór løta fyri okkum, eru foreldrini, Ey›finn og Ingibjørg, samd um. Tey eru ógvuliga errin av døtrunum, sum nú skulu giftast, og børnunum sum heild.

Foreldrini hava havt eitt ordans knoss at ala upp hesi átta børnini í eini tí›, har barnagar›ur var naka› heilt óhugsandi í Vági. Tá elsta barni› var› føtt var Ingibjørg 18 ára gomul og Ey›finn var 17. Nú ver›ur Ey›finn 55 ár Tollaksmessudag og Ingibjørg er 56, og enn hava tey ein son búgvandi heima.

– Eg eri væl nøgd vi› úrsliti›, vit hava fingi› burturúr børnunum. Tey hava øll veri› gó› at ala upp, og í dag eru tey øll komin væl fyri. Men sjálvsagt hevur ta› veri› eitt toyggj at hava átta børn, ásannar Ingibjørg.

Me›an tey elstu børnini vóru smá sigldi Ey›finn í Noreg og var sjálvdan heima.

– Eg minnist, at børnini kalla›u meg fyri ma›urin, tá eg kom heim, gre›ir Ey›finn frá.

Men foreldrini eru væl nøgd og gle›a seg til brúdleypi› í dag. Ey›finn vi›gongur, at ta› ver›ur torført at halda seg aftur vi› at halda fleiri rø›ur, tí hann ivast ikki í, at hann ver›ur rørdur, og so dámar honum so væl at halda rø›ur.

– Men eg skal ikki troytta gestirnar. So eg skal nokk klára at halda mær, sigur Ey›finn læandi.

Sjónvarpi› vi›

Ta› ver›ur ein stór løta, tá tær tríggjar systrarnar seinnapartin í dag leggja lei›ina upp eftir rey›a leyparanum fram til altari› í Vágs Kirkju, til teir tríggjar spentu mennirnar, Suna Poulsen, Tom Villy Magnussen og Andre Joensen me›an vakri sangurin frá Kirkjukórinum Ljómi ljómar í vakra hválvinum í stórfingnu og væl pynta›u kirkjuni.

Eisini onnur enn brú›arpari› hava áhuga fyri forkunnuga brúdleypinum. Ta› er eingin ivi um, at stóra kirkjan fer at ver›a stúgvandi full av fólki. Og tey, sum ikki eru stødd í Vági í dag, fáa eisini høvi at uppliva vígsluna. Sjónvarp Føroya fer nevniliga at taka vígsluna upp og senda hana einafer› seinni.

Ey›finn og Ingibjørg Mørk eru ógvuliga errin av teimum trimum døtrunum. Ta› kom ikki óvart á tey, at systrarnar fóru at halda felags brúdleyp, tí tær hava altí› veri› so tætt kn‡ttar hvørji a›rari

Mynd: Jens K. Vang

Jólakonsert í Kvívík og Vestmanna

Frumframførsla av føroyskari 1000-ára kantatu

TÍ‹INDASKRIV

Um vikuskifti› ver›ur spennandi jólakonsert vi› Vestmanna sangkóri og tónleikarum. Avgjørda høvu›sverki› á skránni er naka› so sjáldsamt sum ein frumframførsla av eini føroyskari kantatu fyri solorødd, kór og tónleikarar. Kantatuna hevur kórlei›arin Kári Bæk skriva› til 1000-ára haldi›.

Konsertirnar ver›a:
Kvívíkar Kirkja leygardagin t. 16. des. kl. 18, og Vestmanna Kirkja sunnudagin t. 17. des. kl. 17.

Kári Bæk, tónleikari, tónaskald og eisini kórlei›ari fyri Vestmanna Sangkóri, fer sjálvur at skipa fyri frumframførsluni av síni egnu kantatu: ”Harri vár drottin”, fyri sopransolo, kór, 2 trompetir, 2 trombonir og orgul.

Teksturin er úr Gomlu testamenti, Sálma 8 (m.a. máttmiklu or›ini: Líti eg at tínum himni, fingraverki tínum, mána og stjørnum, sum tú hevur fest – hvat er tá ma›ur, at tú minnist á hann, og mannabarn, at tær kemur ta› í hug!), og úr N‡ggju testamenti, Matteus 5 og 6 (m.a. tey kveikjandi or›ini: Tit eru salt jar›arinnar... Tit eru ljós heimsins...Stúri› ikki fyri lívi tykkara...Hyggi› at himmalsins fuglum...G evi› tykkum far um liljurnar á markini...Stúri› tí ikki fyri degnum í morgin...).

Ár 2000 er merkisár á mangan hátt. Vit hava hátí›arhildi› at 1000 ár eru li›in sí›ani Føroyar vóru kristna›ar. Men úti um heim hevur nógv veri› gjørt burturúr, at ta› eru li›in 250 ár sí›ani tónaskaldi› J. S. Bach doy›i. Í tí sambandinum ver›a kórverk hjá Bach á skránni, m.a. tann kenda koralin: Jesu meine Freude (ver›ur framførd vi› føroyska tekstinum: Hvør vil á meg klaga), og jólasálmurin: Eg standi tíni krubbi hjá.

Johann Pachelbell er tónaskald úr 17. øld. Hann skriva›i motettina: Nun lobet alle Gott, upprunaliga fyri dupultkór og orgul. Tá á døgum stó›u ofta dupultkór á hvør sínum pulpituri (lofti) fyri at fáa hetta serstaka rúm- og afturljó›i› í kirkjuhválvinum. Hesafer› ver›ur tó framførd ein útseting fyri kór og messingblásara kvartett og orgul. Messingkvartettin hevur leiklutin sum kór 2. Teksturin til hesa motettina er frá Síraki úr Apokryfisku bókunum. Vælkendur er inngangurin til Pachelbelmotettina, Nun danket alle Gott (Nú takki Gu›i øll).

Av klassiskum kórverkum vera eisini at hoyra Ave Maria eftir Vittoria (frá 16. øld), og frá somu tí› Die beste Zeit eftir Vulpius, vi› teksti eftir Luther (ikki nakar vetrarsangur, sum fyrstu or›ini bo›a frá: Mín besta tí› av árinum er tá allir smáfuglar syngja, tá himmal og jør› ljóma vi› vøkrum sangi).

Men hetta er jólakonsert, og tí eru eisini nakrir av okkara vøkru jólasálmum vi›, m.a.: Nú komin eru jól, Jólaklokkan aftur ringir, Til okkum her á lágum stø›um og Fegnist fólk á ja›arkringi.

Umframt Vestmanna Sangkór vi› Kára Bæk sum lei›ara luttaka: Sopransolo: Petra Iversen; Orgul: Oddvør Johansen; Trompet: Steven R. Foggin, Johan Hentze, og Trombone: Atli K. Petersen, Dávur J. Magnussen.

Vestmanna og Kvívíkar kirkjurá› hava veitt stu›ul til konsertirnar bá›ar.

Jólah‡rur í Eysturoynni

Aftur í ár skipar Eysturoyar Kunningarstova fyri einum serligum jólatiltaki í Eysturoynni.

Í dag fer jólabussurin at koyra runt í Eysturoynni vi› jólamonnunum, og teir fara at vitja allar kommunurnar, sum eru limakommunur í Fer›avinnuni í Eysturoy.

Jólabussurin ver›ur pr‡ddur vi› granni og ljósum, og jólamenninir fara at b‡ta pakkar ella karamellur út.

Koyrt ver›ur runt í bygdunum/b‡unum, og bussurin ste›gar vi› jólatrøini.

Fyrivarni ver›ur tó tiki› fyri koyrilíkindunum.

Skráin er henda:

10.00 Skáli, 10.30 Strendur
11.30 Nor›skáli, 12.00 Ei›i, 12.45 Gjógv, 13.30 Funningur, 14.00 Funningsfjør›ur, 14.45 Oyndarfjør›ur, 16.00 Runavík, 16.45 Gøta, 17.30 Leirvík, 18.15 Fuglafjør›ur

Eysturoyar Kunningarstova ynskir øllum eini Gle›ilig Jól.